## VIÐMERKINGAR

# »Dimmalætting« lýgur fyri sínum lesarum

**Óli Jacobsen**
*Tórshavn, 3.januar 2001*



Tá “Dimmalætting” hóast innsend í seinastu viku ikki hevur hýst hesi grein, fari eg at biðja “Sosialin” gera mær tann beina at hýsa henni.

»Dimmalætting« hevur áhaldandi gjøgnum alt árið 2000 lagt FF-blaðið undir at hava stjolið tíðindini úr norska fiskivinnublaðnum »Fiskaren« uttan at FF vil gjalda nakra samsýning aftúrfyri.

### Hava loyvi frá »Fiskaren«

Vit hava fleiri ferðir greitt frá hesum máli. Men fyri at sleppa undan »mytum« og fyri at kunna vísa á trúvirðið í »Dimmalætting« og tess nú blaðstjóra Georg L Petersen skal málið hesa ferð skerast út í papp.

Fiskimannafelagið hevur altíð hildið seg hava góð viðurskifti við »Fiskaren«. Vit hava hildið blaðið »í ævir«. Vit hava verið tøkir tá teir hava viljað havt viðmerkingar og hava eftir umbøn útvegað teimum tað tilfar, sum teir hava ynskt, og FF hevur mett hetta sum náttúrligt millum bløð sum samstarva.

Í 1988 fingu vit loyvi frá teimum at »klippa« í blaðnum, og hava vit havt onkrar stubbar og greinir í FF-blaðnum gjøgnum øll hesi árini, og hava vit mett hetta sm ein náttúrligt samstarv millum bløð. Hvussu “umfatandi” hesin “stuldur” hevur verið kann síggjast á uppgerð sum blaðmaður á “Fiskaren” sjálvur hevur gjørt fyri árini 1998 og 1999. Hesi árini er “Fiskaren” komin út 300 ferðir. Um tað verður roknað við 25 greinum og stubbum í hvørjum “Fiskaren” gevur hetta 7.500. Av hesum hava 19 teirra verið heilt ella partvíst endurgivnar í FF-blaðnum, sum er komið út 50 ferðir hesi somu ár. Hesar 19 endurgevingar hava verið í 11 av hesum 50 FF-bløðum. So her er talan um smáttari hjá báðum bløðum.

### »Fiskaren« fráfellir krav

Í aug. 1998 fær FF-blaðið eina rokning frá “Fiskaren” uppá nkr. 12.800 fyri tilfar sum vit hava brúkt úr blaðnum. Av hesum vóru kr. 8.000 fyri greinir og kr. 4.800 fyri myndir. Blaðstjórin á FF-blaðnum tekur málið upp við “Fiskaren” og heldur hann hetta vera í meira lagi. Úrslitið verður, at “Fiskaren” **sleppir** kravinum uppá tær kr. 8.000 fyri greinir, meðan semja var um, at FF-blaðið skuldi gjalda tær kr. 4.800 fyri myndir.

Hetta má sigast at vera ein avtala í tráð við tilsøgnina frá 1987 hvat teksti viðvíkir, og blaðstjórin á FF-blaðnum hevur hildið, at hervið var leisturin lagdur fyri samskiftið framyvir.

Fiskimannafelagið frættir einki aftur fyrr enn fyrst í 2000, tá “Fiskaren” gjøgnum “Dimmalætting” leggur FF-blaðið undir stuldur av tilfari. Síðan tá hevur FF-blaðið einki tilfar havt úr “Fiskaren”. Tó við undantaki av einum stubba har “Fiskaren” sjálvur verður lagdur undir “stuldur” av eini mynd úr einum álmanakka, sum teir noktaðu at gjalda fyri, tí hetta hildu teir seg ikki hava nakra skyldu til! Vit hava boðað “Fiskaren” frá, at vit fegin vilja gjalda tær kravdu kr. 375 fyri hvørja ferð vit nýta hesa grein. Tí hon vísir nevniliga dupultmoralin hjá “Fiskaren”.

Av onkrari orsøk kom gjaldingin av teimum kr. 4.800 í drag. Men í februar 2000 kemur ein rykkjari frá “Fiskaren” sum er teirra egna uppgerð yvir okkara restskuld hjá teimum, nevniliga umrøddu kr. 4.800. Upphæddin verður goldin beinanvegin.

### Fáa tvífalda rokning fyri krav sum er slept

Nú hildu vit okkum hava slætt borð. Og vit vildu eisini hava skipaði viðurskifti framyvir. Tá so íslendski blaðmaðurin á “Fiskaren” Magnus Thor Hafsteinsson (MTH), sum er kelda hjá “Dimmalætting”, í summar hevði eina grein um kvotaskipanina í Íslandi, sum vit hildu hava áhuga hjá okkara lesarum biðja vit hampiliga “Fiskaren” um loyvi til at prenta hesa grein. Vit fáa eitt sera óhampiligt aftursvar frá MTH, sum segði korta nei til hetta ynski.

Í september frætta vit aftur frá hesum sama MTH. Nú sendir hann okkum vegna blaðfólk á “Fiskaren” eitt krav uppá nkr. 44.510 vegna tilfar sum FF-blaðið hevur nýtt úr “Fiskaren”.



Kystens næringsavis
Fiskaren
Slottsgaten 3 - P.Box 4053 Dreggen
N-5023 Bergen
Telefon 55 31 43 00
Postgiro 0805 33 82097
Bankgiro 6511 05 04653
Christiania Bank Swift adr. XIANNOKK

ANNONSEFAKTURA

BLADID FF V/VILMUND JACOBSEN
PB. 58
FR-110 TORSHAVN
FÆRØYENE

Kundenr 21989
Fakturanr 67010
Fakturadato 280898
Forfallsdato 140998

| FØRSTE INNR.DATO | ANNONSØR/ TEKST | | ANT. SP. | ANT. MM | PRIS MM | ANT. INNR | RABATT % | REKV. NR. | NETTO BELØP |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 280898 | 6 BILDER | BILDE | 1 | | | 1 | 100 | | 4800.00 |
| 280898 | DIV.ARTIKLER | ARTIKLER/RED | 1 | | | 1 | 100 | | 2000.00 |
| 280898 | DIV.ARTIKLER | ARTIKLER/RED | 1 | | | 1 | 100 | | 3000.00 |
| 280898 | DIV.ARTIKLER | ARTIKLER/RED | 1 | | | 1 | 100 | | 3000.00 |

Til tross for tidligere purring, kan vi ikke se å ha mottatt oppgjør for nedenforstående fakturaer, og ser oss derfor nødt til på nytt å be Dem om å snarest ordne opp i vårt tilgodehavende.
Stemmer ikke vårt krav med Deres noteringer ber vi Dem kontakte oss!

67010 1.01.99 UTG.FAKT 28/08 15.01.99 4.800,00
Gebyr for denne betalingsoppfordring 20,00
Sum beløp Kr. 4.820,00

*Her endurgeva vit fyrst rokningina frá “Fiskaren” frá 28.8.98. Hon ljóðar uppá kr. 8.000 fyri ymiskar greinir og kr. 4.800 fyri myndir.*

*Seinni fráfellur “Fiskaren” kravið fyri greinirnar meðan avtalað verður, at kr. 4.800 skulu gjaldast fyri 6 myndir.*

*Prógvið fyri hesum er niðari parturin sum er ein rykkjari eftir teimum kr. 4.800, sum verður goldnar beinanvegin.*

*Men nú krevur heimildarmaðurin hjá “Dimmalætting” góðar kr. 16.000, fyri tær greinir, sum “Fiskaren” sum upprunaliga kravdi kr. 8.000 fyri, men har kravið seinni er slept.*

*Henda próvførslan tekur einsamøll grundarlagið undan herferðini hjá hjá GLP móti FF-blaðnum. Men GLP heldur ikki, at lesarar hansara eiga at fáa kunnleika til hesa avgerandi kunning. Tí hon vil jú oyðileggja alla søguna. Hetta man siga nóg mikið um hvussu “óheft og álítandi “Dimmalætting” er*

Í hesum kravi er fleiri andsagnir. Her skal bert verða nevnd ein teirra:

Í nevnda kravi eru kr. 16.140 fyri eitt tíðarskeið har “Fiskaren” longu frammanundan hevur slept hesum kravi. Hetta krav var jú upprunaliga kr. 8.000. Men nú kemur MTH aftur umaftur við einum kravi sum er dupult so stórt sum tað slepta kravið upprunaliga var! Eingin hevði lopið á leistum fyri einum slíkum kravi.

Men FF vildi fegið hava skipað viðurskifti við “Fiskaren”. Tí skrivaðu vit 24. november til blaðið og mæltu til at fáa viðuskiftini partanna millum í rættlag. Aftursvarið frá blaðstjóranum Nils Torsvik var eins ófólkaligt sum tað frá MTH og váttaði tað sum blaðstjórin longu hevur boðað frá gjøgnum “Dimmalætting”, at framtíðar samstarv var útilokað!

Hetta hava vit tikið til eftirtektar. Og FF-blaðið hevur nú heldur ikki nakran trupulleika av at vera “Fiskaren” fyri uttan.

### Ber ikki til at gjalda

Men hetta merkir samstundis, at vit eru settir í ta støðu, at vit ikki kunnu gjalda “Fiskaren” ella tess blaðfólki eitt oyra hetta kann vera fatað, sum at vit játta skuldsetingina um “stuldur”. Vit vilja heldur ikki útseta okkum fyri, at teir á “Fiskaren” enn einaferð fara at koma aftur umaftur við nýggjum krøvum fyri viðurskifti, sum eru avgreidd, sum jú longu er hent við umrøddu rokning. Tí kunnu vit ikki gjalda nakað uttan at verða dømdir til tað. Tá kunnu hesar eftir okkara tykki ógrundaðu skuldsetingar um stuldur standa sína roynd.

Men teir á “Fiskaren” munnu ikki vera so vísir í síni sak. Samb. teirra hóttanum skuldu teir longu fyrst í oktober verið farnir víðari við málinum. Men hóast nærum 3 mánaðir eru farnir hava vit einki frætt enn.

Hinvegin høvdu vit við vanligari mannagongd millum sivilseraðar partar lættliga kunnað fingið hesi viðurskifti greidd. Eisini tann fíggjarliga partin, tí FF hevur víst, at vit einki hava ímóti eini avtalu, sum eisini umfatar rímiligt gjald fyri tilfar og myndir.

### Váttar blaðmannastøðið hjá Georg L Petersen

Sum lesarin skilir, so er hetta í verunleikanum eitt sera lítið mál. Men hóast hetta hevur GLP ótroyttiliga dyrkað hesa sakina í eitt heilt ár, tá málið veruliga var endað, tí vit hava als ikki hava nýtt “Fiskaren” sum keldu alla hesa tíð.

“Dimmalætting” hevur við sínum tíðindastjóra útilukkandi lýst hetta málið út frá sjónarmiðnum hjá “Fiskaren”. Hóast vit fleiri ferðir hava greitt frá, at vit hava goldið ta upphædd sum vit hava avtalað og fingið rokning fyri, hevur GLP ferð eftir ferð fortalt sínum lesarum, at vit ikki vilja gjalda. Orsøkin hevur verið tann einfalda, at hjá GLP skuldi hetta mál nýtast til at seta iva um trúvirðið hjá FF-blaðnum og fiskimannafelagnum. Og tí hava hesir upplýsingar, sum ikki tæna hesum sjónarmiði, ongan áhuga.

GLP tykist hava fingið FF-blaðið í rangastrúpan. Orsøkin er at tíðindini í FF-blaðnum eru grundað á grundleggjandi kanningar av einum og hvørjum máli, har eingin enn hevur kunnað sett eitt spurnaðartekin. Besta prógvið fyri hesum er júst hetta málið.



Bergen, 23. februar 1988.

Ad spørsmål om utklipp fra Fiskaren.

Viser til brev av 17. ds., der det stilles spørmål om lov til å "klippe" fra vår avis. Vi for vår del synes det er meget positivt. Og har selvsagt ikke noe mot at så gjøres. Den eneste betingelsen vi stiller, er at navnet Fiskaren kommer med. Ellers ønsker vi lykke til med tiltaket.

*Hetta greiða loyvið frá 1987 staðfestir, at tað tað er púra grundarleyst at leggja FF undir nakað slag av stuldur. Um “Fiskaren” hevði hildið, at henda tilsøgnin var misskilt hava teir havt meginpartin av 10 árum at gera vart við seg. Hóast hetta frættir FF einki fyrr enn í 1998. Og tað krav sum tá verður sett fram verður, burtursæð frá gjald fyri myndum, tikið aftur og kann heta bert styrkja fatanina hjá FF av hesi tilsøgn*



## VIÐMERKINGAR

### “Dimmalætting”: Kanning er ódygd!

Tað er annars rættuliga avdúkandi fyri tíðindtænastu í Føroyum, at tað, sum skuldi verið ein fyritreyt fyri allan tíðindaflutning, nevniliga kanning og harvið undirbygging av tíðindum, av “Dimmalætting” verður roknað sum ein ódygd.

Men tað ber so ikki til at skuldseta “Dimmalætting” fyri hesa ódygd, og er umrødda mál eitt sera gott dømi um tað.

Í FF-blaðnum 7. og 21. desember kundu vit lýsa tíðindaflutningin hjá “Dimmalætting” samb. prinsippunum hjá GLP.

Hetta verður gjørt í einum slíkum álvarsmáli sum trygd á sjónum, har partur í málinum seinni gjørdist landsstýrismaður. Prógvað verður í FF-blaðnum hvussu lætt tað er hjá “makthavara” at “bestilla” tíðindini, so tey passa hansara høvdi.

Henda søgan verður brúkt, tí her er talan um eitt mál, har tað lættliga ber til at eftirkanna alla hesa “tíðindasøgu” frá byrjan til enda.

### Tíðindi kunnu bíleggjast

Tað er prófvfast, at “Dimmalætting” rátt hevur endurgivið “bíløgdu” tíðindini uttan at seta nakran spurning við tey og uttan nakra sum helst kanning. Og hevur í besta “Pravda”-fyrr stíli nýtt nevna part í sakini, sum bæði áður og serliga aftaná hevur prógvað sítt væntandi trúvirði, sum einastu keldu. Samstundis eru alment tilgeingilig skjøl, sum veruliga vildu lýst málið, tilætlað burturtøgd. Úrslitið er eisini tíðindi sum heilt gjøgnumført eru ósonn, villeiðandi og manipulerandi og sum miðvíst hava slagsíðu annan vegin.

Her skal bert verða nevnt eitt dømi um hvussu miðvís villeiðingin hevur verið. “Dimmalætting” hevur 17.10 frágreiðing um bótina sum viðkomandi fekk. Lesarin fekk ta fatan, at her var talan um almenn tíðindini frá politistøðini í Runavík. Kanningar hjá FF-blaðnum vístu, at hagani vóru eingi tíðindi komin! Tey vóru í veruleikanum handað “hansara” fjølmiðlum av nevnda parti í málinum, sum hevði snøggað tey til sum hann vildi hava tey framborin. Samstundis vóru tey veruligu tíðindini frá sama myndugleika burturtøgd. Tey passaðu nevniliga ikki til bíleggingina.

### Fjølmiðlafólk “heilagar kýr”

Sum tað skilst hevur GLP rættuliga tikið við læru, tá hann var í starvsvenjing hjá Pravda í 80-unum. Her var høvuðsuppgávan hjá tíðindafólki bert at **endurgeva** “bestilt” tíðindi. Tað er júst tað sama sum er gjørt í hesum førinum, og tann sum fylgir tað minsta við veit, at hetta er støðið á politiska tíðindaflutninginum hjá hinum fjølmiðlunum, sum øll “tilvildarliga” hava lýst umrødda mál um trygd á sjónum á sama hátt.

Er tað nakað sum brúk er fyri í Føroyum er tað eitt orðaskifti um fjølmiðlarnar og tíðindaflutningin í Føroyum. Men hetta orðaskifti kemur ikki. Tí samb. fjølmiðlafólki sjálvum kann eingin fortelja teimum nakað. **Tey** umboða sannleikan, og so skal eingin siga nakað annað. Tað kemur fyri at borgarin klagar um tíðindaflutningin. Men tað er valla komið fyri enn, at ein blaðstjóri hevur viðgingið, at hann hevur mistikið seg.

Georg L Petersen skal í hvussu hava tøkk fyri, at hann so opinlýst váttar, hvørji prinsipp eru galdandi fyri tann tíðindaflutning, sum hann hevur ábyrgdina av. Men mótsatt hesum tíðindaflutningi veit lesarin av FF-blaðnum, at har ber so ikki til hjá nøkrum at “bestilla” síni egnu skræddaraseymaðu tíðindini.



## Viðvíkjandi málinum um skipbrotið hjá Torbirni Jacobsen, landsstýrismanni

Sambært áheitan frá landsstýrismanninum, hevur ting- og landsstýrismanning Tjóðveldisfloksins viðgjørt málið um, at Tórbjørn Jacobsen hevur tikið við eini bót í sambandi við skipbrotið hjá Halgafelli í januar 2000.

Landsstýrismaðurin hevurgreitt frá málinum og hevur sagt seg vera tilreiðar at taka neyðugar politiskar avleiðingar, um flokkurin metir hetta vera tyngjandi fyri álitið á flokkin, landsstýrismannin, landsstýrið og álitið á politisku skipanina.

Á fundinum var semja um, at viðgerðin av tílíkum málum hevur stóran prinsipiellan týdning, tí tey skapa fordømir frameftir fyri tey politisku mørkini og krøvini, sum verða sett landsstýrismonnum.

Tað er álvarsmál, um landsstýrismenn verða skuldsettir, ákærdir ella koma í rættin fyri brot á løggávuna. Men neyðugt er at skilja ímillum, hvat málið snýr seg um.

- Er talan, um mál, ið hevur við embætisførsluna hjá landstýrismanni at gera?
- Er talan um brot á revsilógina, sum altíð vil verða tyngjandi?
- Er talan um brot á aðra løggávu? Er talan um viljað, óviljað ella hendilig brot?
- Er talan um mál, sum eru avgreidd og kend?
- Er talan um annað, sum kann verða tyngjandi út frá eini politiskari meting?

Tí má ein politisk meting gerast í hvørjum einstøkum føri, um hvørt hetta er tyngjandi fyri ein persón, ein politikara og ein flokk.

Í hesum føri er talan um eina hending, sum var alment kend og væl lýst, áðrenn persónurin gjørdist landsstýrismaður, og sum onki samband hevur við embætisførslu. Málið kemur upp, tí talan eftirfylgjandi verður um skuldseting fyri óviljað brot á sjólógina í sambandi skipbrotið fyri, sum skiparin hevur tikið fulla ábyrgd av. Sambært upplýsingum frá Sjóvinnufyrisitingini er tað vanlig mannagongd, at skiparar fáa uppskot um bót í sambandi við skipbrot. Talan er um hendiligt og óviljað brot, sum ikki fær nakrar víðari avleiðingar fyri skiparan.

Onki nýtt er komið fram í málinum, sum ikki var alment kent og kom fram undir sjóforhoyrinum.

Á fundi millum ting- og landsstýrismanning í gjár var niðurstøðan, at Landsstýrismaðurin eigur ikki at taka aðrar politiskar avleiðingar av hesum máli, enn at avgreiða bótina og framhaldandi at greiða almenninginum frá øllum lutum í málinum.

Høgni Hoydal
floksformaður

*Viðgerðin av hesum tíðindaskrivi váttar niðurstøðuna í greinini. “Dimmalætting” setur tíðindaskrivið upp sum eina (trúverda) tíðindagrein, har innihaldið í tíðindaskrivinum verður rátt endurgivið uttan spurning og uttan minstu kanning av teimum givnu upplýsingunum.*

*“Tilvildarliga” lýsa hinir fjølmiðlarnir tíðindini á sama hátt.*

*Tíðindaskrivið sær eisini sera tilforlátiligt út. Alt tilfar er fingið til vega og málið er kannað og viðgjørt til lítar. Men ein nærri kanning vildi víst, at hetta tíðindaskriv er merkt av somu ósannindum, villeiðingum og manipulatiónum, sum annars er eitt eyðkenni fyri tíðindaflutningin í hesum máli.*

*Um tann avgerandi spurningin í málinum skrivar Høgni Hoydal, at skiparin á “Halgafelli” aftaná óhappið “bert” varð skuldsettur fyri óviljað brot á sjólógina. Lesarin fær lættliga ta fatan, at henda úlegging tær kanningar, sum skulu vera gjørdar í málinum. Men brævið frá Søfartsstyrelsen til Fútan dagfest 22.september sigur nærmast tað mótsatta! “Óviljað brot” er als ikki nevnt. Hinvegin er talan um ávísa “skærpende omstændinghed”. Tískil er tað privata útleggingin hjá skiparanum, sum verður lýst sum komandi frá einum almennum myndugleika. Og at málið skal hava verið fult “alment kent og væl lýst”, áðrenn viðkomandi gjørdist landsstýrismaður er í mesta lagi “hálvur sannleiki”. Tískil er grundarlagið burtur undan trúvirðinum í øllum tíðindaskrivinum.*

*Tveir spurningar reisa seg í hesum sambandi: Tá ein floksleiðari og varaløgmaður, enntá justitsministari”, fer so lætt um sannleikan sum í hesum førinum, nær skal borgarin so trúgva honum? Og tá fjølmiðlarnir so glaðbeintir bera slík ósannindi víðari, nær skal borgarin so trúgva teimum?*

Karin Kjølbro, kriminalforsorgarleiðari:

# Seljið Brimil

**Karin Kjølbro**
*Argir hin 11. januar 2001*



**Í Svøríki hava tey elektroniskar eftirlitsboyjur á fongsulsdømdum. Tey búgva heima og arbeiða hvønn dag, og so beint heim eftir arbeiði. Kriminalforsorgin heldur eyga við, at tey eru heima og annars ikki sleppa út yvirhøvur. Hetta er alternativ til at sita í fangahúsi. Hetta er bíligari fyri samfelagið, og hin dømdi kann røkja sítt arbeiði, meðan hann avsitur dóm. Avlesingarboyjan situr um øklaknútin og ongin varnast hana**

Øll skip, sum sigla undir Føroyum, kunnu eisini hava avlesingarboyju, so Vaktar- og Bjargingartænastan kann fylgja við, hvar ið tey eru, og hvat tey gera.

Sat so alspent í kvøld og bíðaði eftir úrslitinum av fundi millum landsstýrismannin Karsten Hansen og Skipara- og Navigatørfelagið seinnapartin í dag. Aftur nú úrslitaleyst. Hvat hugsa partarnir?

Vit eru mong, ið hava ilt av, at grunnarnir liggja víðopnir fyri ránsveiðu, meðan stríðst verður um lønarsáttmála. Hetta er sjálvt lívsgrundarlag okkara, ið verður ofrað í lønarstríði.

Nú er skjótt ársfjórðingur farin, uttan at partarnir nærkast hvør øðrum. Mong halda vit, at lønirnar umborð á skipunum hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni eru ov lágar. Slíkt eigur nevndin hjá fakfelagnum at samráðast við Landsstýrið um, tá samráðingar vanliga fara fram. Hví er so lítið komið av skafti higartil á hesum øki?

Ólukkuliga støðan er eisini við til, at fólk og føðiland eru útstillað á ódámligan hátt í grannalondum okkara.

Avlesingartólið, ið omanfyri er nevnt, kann eisini setast á skip okkara. Tað kann siga Vaktar- og Bjargingartænastuni hvar skip eru, hvussu ferðin er og hvat tey gera, um tey t.d. fiska ólógliga.

Øll vita vit, at í neyðstøðu er skip neyðugt, og tá eru aðrar reglur galdandi, men umráðandi er, at lívsgrundarlag okkara ikki er offur fyri tilvildarligum lønarstríði. Tí er stundum komin til at kannað verður, um ikki Vaktar- og Bjargingartænastan skal finna alternativar loysnir.